VB-ÍF 0-1 (0-0):

# ÍF aftur fult í Vági

**Høgni Zachariassen stútaði einasta málið í uppgerð, har tað var langt millum uppløgdu málmøguleikarnar**

VB-ÍF
*Jóannes Hansen*

Myndin var tann sama 2. páskadag á Vágseiði, sum hon hevði verið eina stóra viku frammanundan. Vágbingar fóru enn eina ferð vónbrotnir til hús, eftir at eitt av liðunum, sum teir av góðum grundum hava roknað við at skula vinna á heimavølli ímóti, hevði tikið alt. Og sjálvandi stórfegnaðust fuglfirðingarnir, tá ið teir í góðveðrinum fóru norður aftur um Suðuroyarfjørð at fyrireika seg til fyrsta heimadystin, ið verður ímóti GÍ, sum teir nú hyggja niður á á støðutalvuni!

Kanska onkur veit um, at ÍF í landskappingin hevur vunnið á Vágseiði. Í skrivandi løtu kunnu vit ikki vísa á tað árið.

Petur Simonsen hevði tveir av veteranunum við til Vágs, sum ikki vóru har suðuri næstsíðsta sunnudag. Magni á Lakjuni og Bartal Eliasen vóru eftir ávikavíst sjúkralegu og knæskaða tøkir aftur. Men ÍF venjarin valdi at halda seg til gomlu vendingina um, at eitt lið, sum hevur vunnið, skal ikki brotast.

Magni og Bartal vóru á beinkinum, og teir vórðu ikki settir á vøllin fyrrenn í 2. hálvleiki.



*Símun Eliasen hevði til uppgávu at ansa spælskiparanum hjá VB, Milan Culic, og hetta eydnaðist somikið væl, at ÍF fyri aðru ferð innan í góða viku fekk fult í Vági*
Mynd: Áki Bertholdsen

### Fáir møguleikar

Lotið var ikki so ógvusligt, men tað ávirkaði eitt sindur. ÍF hevði lotið ímóti í 1. hálvleiki, og tá høvdu teir betri taka á samanspælinum, enn teir høvdu eftir steðgin. ÍF hevði ilt við at spæla seg til upplagdar málmøguleikar, og tað høvdu teir á heimaliðnum eisini. Allan Joensen í ÍF málinum, og super veteranurin Bjarni Johansen í VB málinum vóru ikki ovbyrðaðir av arbeiði.

Á sentrala VB miðvøllinum vísti Milan Culic enn eina ferð, at hann er ein tann besti - um ikki tann besti - miðvallarin í føroysku kappingini. Hjá ÍF hevði Símun Eliasen uppgávuna at taka sær av lyklaspælaranum hjá VB. Hin sentrali miðvallarin hjá ÍF var Høgni Zachariassen, og tað var júst hann, sum tá ið eitt lítið korter var farið av seinna umfarinum, skoraði einasta málið. Long frísparkssending varð løgd inn í VB brotsteigin, og Høgni snittaði við høvdinum bóltin inn um Bjarna Johansen.

Tá ið ÍF var komið framum, tóktist tað sum um, at uppspælið hjá teimum mest sum datt burtur. Roynt varð at leggja langar sendingar fram til Bartal Eliasen og Magna á Lakjuni, men tað spurdust ikki møguleikar burturúr. VB royndi at leggja trýst á. Eftir steðgin høvdu teir sett veteranin Jón Paula Olsen inn, men tað segði tað sama. Vágbingar góvu til kennar, at teir vóru misnøgdir við, at dómarin ikki bríksladi fyri brotssparki ímóti fuglfirðingum. Men tað var dómarin ikki samdur við teimum í, og so fóru øll stigini av Eiðinum og norður til Fuglafirðar.

## FAKTA UM DYSTIN

**VB-ÍF 0-1 (0-0)**
0-1: Høgni Zachariassen 58.

**Dómari:** Birgir Sondum

**VB:** Bjarni Johansen - Mortan úr Hørg, Anders Sørensen, Michael í Lágabø, Kári í Lágabø - Eyðstein í Lágabø (Jón Pauli Olsen, 46.), Evrad Ble, Milan Culic, Símun Samuelsen - Sigmund Mikkelsen (Poul N. Poulsen, 55.), Dan Djurhuus

**Gult kort:** Evrad Ble og Símun Samuelsen

**ÍF:** Allan Joensen - Eyðolvur R. Petersen, Poul Ennigarð, John Thomsen, Fritleif í Lambanum - Hanus Eliasen, Símun Eliasen, Høgni Zachariassen, Rúni Elttør (Atli Petersen, 90.) - Sylla Amed Davy (Magni á Lakjuni, 60.), Gunnar Nielsen (Bartal Eliasen, 78.)

**Gult kort:** Bartal Eliasen og John Thomsen

# Petur var ovurfegin

**ÍF venjarin hevði vónað, at tað skuldi bera til tvær ferðir at fáa fult í Vági, men hann ásannar, at hann ikki roknaði tað sannlíkt**

ÍF VENJARIN
*Jóannes Hansen*

ÍF venjarin ásannar, at hann og hansara eru ovurfegnir um, at tað eydnaðist bæði at vinna sess í fjórðings finaluni í steypakappingini og trý stig í landskappingini í Vági.

– Eg hevði sjálvandi vónað, at tað skuldi bera til, men eg ásanni, at tað var optimistiskt, tí ÍF plagar at hava torførar dystir í Vági. Men spælararnir skulu hava rós fyri, at teir stríddust væl, og at teir bæði megnaðu at halda tætt í verjuni, og at teir megnaðu at skora málið, sum var so sera týdningarmikið.

*Ert tú nøgdur við avrikið?*

– Tað sigur seg sjálvt. Spælararnir hava loyst tær báðar uppgávurnar, sum stóðu fyri framman undan fyrru ferðini til Vágs, til fulnar. Um eg skal seta fingurin á okkurt, so skal tað vera, at vit vóru ikki nóg dugnaligir at halda fram at spæla, tá ið vit vóru komnir framum 1-0. Tá kendist tað sum um, at vit fóru at sparka meiri og spæla minni, og tað gjørdi uppgávuna hjá okkum síðsta hálva tíman torførari, enn hon longu frammanundan var. Men tíbetur spældi tað væl av, staðfestir Petur Simonsen.

# VB er mitt í ættarliðsskifti

**Venjarin harmast um, at tað í tveimum uppgerðum ímóti ÍF ikki hevur eydnast at fáa hol á málskjótingina, og at nýggi álopsspælarin ikki sleppur at spæla við**

VB VENJARIN
*Jóannes Hansen*

Vágbingar hava ein stóran trupulleika. Hann er, at teir ikki fáa mál. Tað staðfestir venjarin John Christensen, eftir at VB í tveimum uppgerðum ímóti ÍF – fyrst í steypakappingini og so í landskappingini – ikki hevur megnað at spæla seg til stórar møguleikar og at skjóta mál í tveimum dystum á heimavølli.

– Vit eiga ein spæla, sum eitur Nenad Zivanovic. Hann er keyptur henda vegin fyri at spæla í álopinum og harvið vónandi at gera mál. Men loyvini hjá honum eru ikki í lagi, og tað er spell.

*Verður hann við í Klaksvík?*

– Eg dugi ikki at siga tær, men vit vóna tað, sjálvt um tað í løtuni einki vist er at siga um hetta.

*Hví fáa vit ikki mál?*

– Tað er ein góður spurningur. Eg eri nøgdur við, at tað eydnaðist okkum so at siga at halda teimum burtur frá møguleikum. Men vit megna ikki at spæla okkum til møguleikar. Tað er ein veruleiki, at fleiri av spælarunum eru nýggir á besta liðnum, og tað tekur sína tíð at spæla ungar menn inn á liðið og at fáa fremmandar menn og føroyingar at spæla saman. Men vit mugu arbeiða við at betra um uppspælið og royndirnar ímóti málinum, staðfestir John Christensen, venjari hjá VB.